


# ER KUNNINGARTØKNIN TÍN HEIMUR?

**Elektron er ein livandi KT-fyritøka í støðugari menning, sum tørvar starvsfólk á fleiri økjum til nýggjar avbjóðingar. Er tú ágrýtin og álítandi? Sigur tú tína hugsan og tekur ábyrgd? Vit hava eina sunna virkismentan og góðar starvsfelagar. Gott samstarv við kundar er av alstórum týdningi. Kennir tú teg væl í hesum og lúkar tú krøvini í einum av niðanfyristandandi starvslýsingum, so set teg í samband við okkum.**

## STARV INNAN KT-TRYGD

Saman við okkara KT-trygdarleiðara skal tú stuðla leiðsluni, starvsfelagum, peningastovnunum og øðrum stovnum í arbeiðinum innan KT-trygd.
Tú skal í stóran mun finna fram og skjalfesta skilagóðar trygdarloysnir, tað veri seg innan mannagongdir, fyriskipanir ella trygdakrøvum.
Vit vænta at tú hevur royndir við KT-trygd ella KT-grannskoðan.
Tú dugir væl at skriva á føroyskum og donskum, klárar teg á enskum.
Arbeiðir sjálvstøðugt og dugir at síggja alternativar loysnir

Hevur tú spurningar, ring til Jógvan Joensen

## PROJEKTLEIÐARI TIL NETØKIÐ

Vit leita eftir einum starvsfelaga innan projektleiðslu á netøkinum, ið saman við okkara netfólki skal menna og reka netøkið.

Tú ert málsøkin og nærlagdur, dugir at síggja alternativar loysnir, dugir at arbeiða bæði sjálvstøðugt og í toymi, yvirheldur freistir og dugir væl at samskifta, bæði í skrift og talu

Hevur tú spurningar, ring til Niels Chr. Nolsøe

## STARV INNAN UNDIRSTØÐUKERVIÐ

Tú skal saman við okkara kervisfólki verða við til at menna undirstøðukervið, serliga á Citrix grundvølinum. Arbeiðið verður at seta upp, viðlíkahalda og skjalfesta loysnir í undirstøðukervinum. Tú kemur at arbeiða bæði sjálvstøðugt og saman við øðrum.

Umsøkjarar við royndum í uppseting av Windows, lokalnetum og Citrix servarum og klientum hava fyrimun.

Hevur tú spurningar, ring til Hallur Hjelm

## SØLU/INNKEYPARI

Vit sóknast eftir einum starvsfelaga til sølu- og innkeypsfunktiónina. Arbeiðið fevnir um alt frá innkeyp, goymslu til sølu. Best er um tú hevur royndir við keyp og sølu av KT-útgerð. Umsøkjarar við roydum við bókhaldsskipanini Navision Financials hava fyrimun

Tú ert røkin og nærlagdur, dugir væl at samskifta bæði í skrift og talu og at arbeiða bæði sjálvstøðugt og í toymi

Hevur tú spurningar, ring til Hans Jákup Langgaard

## STARV INNAN FYRISITING

Okkum tørvar ein starvsfelag innan fyrisitingina. Arbeiðið fevnir um bókhald og skrivstovuarbeiðið
Tú kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við bókhaldaran og fíggjarleiðaran.
Tú kemur eisini at samskifta nógv við okkara starvsfólk, kundar og veitarar.

Royndir innan alt vanligt skrivstovuarbeiðið og við bókhaldsskipanini Navision Financials er ein fyrimunur.

Hevur tú spurningar, ring til Ásbjørg Arge

## KANTINUARBEIÐIÐ

Vit leita eftir einum starvsfelaga at arbeiða parttíð í kantinuni hjá okkum. Vit vænta at tú hevur royndir innan kantinuarbeiði ert røkin og fyrikomandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Hevur tú spurningar, ring til HildurThomassen

Lønin verður ásett eftir royndum og útbúgving.

**UMSÓKNARFREIST** Umsóknir við avriti av møguligum prógvum skulu verða okkum í hendi innan 22. februar 2007 og skulu sendast til: P/F Elektron, Staravegur 9 Postboks 3219, FO-110 Tórshavn, Tlf.345100, Fax: 345101 ella við telduposti til ulla@elektron.fo

**Elektron** Okkara visjón: Vit vilja vera kend fyri at trygdin og rakstrarstøðufesti eru høgt raðfest. At skipanar- og tænastuveitingar okkara gera kundarnar førar fyri at fremja framúr avrik á teirra øki. At vit eru eitt spennandi arbeiðspláss, har starvsfólkið trívist, fær hóskandi avbjóðingar og fær møguleika at menna seg og har starvsfólkið er eyðkent við at vera eldhugaði, ábyrgdarfull og smidlig. Okkara virðir: Vit leggja dent á at tú tosar beint fram, ert álítandi, tekur ábyrgd og dámar at arbeiða saman við øðrum